VALGREINAR

# Tjóveldisfloksins mentanarpolitikku r dúvar uppá Dansk Tipstjeneste

**Eyðólv Dimon**
*Valevni Javnaðar-floksins í Suðurstreymoy*



Allar mentaðar tjóðir vilja verja sína mentan og tey serligu eyðkenni, sum annars mynda eina tjóð. Men teir og tær, sum skuldu standa fremst í fylkingini, royndust undanstøkkingar - sum vant var tjóðskapurin mest omanfyri hálsvølin. Tað eru skjótt fýra ár runnin síðan fullveldissamgongan tók yvir, og nú teir eru á veg út gjøgnum dyrnar kom endiliga mentanarpolitiska ætlanin, sum skal vera fyri árini 2002 - 2006. Var nakað álvara aftan fyri tjóðskapar klædningin, so hevði fullveldissamgongan sjálvandi lagt út við eini mentanarpolitiskari ætlan fyri árini 1998 - 2002, og játtanin til Mentanargrunnin hevði verið økt samsvarandi. Áliti Avmarkaður marknaður mælti til, at játtanin til Mentanargrunnin varð fingin uppá 15 mió. í 1998, og við fíggjarligu umstøðunum, sum hendan samgongan hevur havt at virka undir, so sigur tað alt um raðfestingina hjá samgonguni av mentanini, nú játtanin í 2002 einans er 3 mió. Einastu ábøturnar hetta samgonguskeiði, eru komnar frá øðrum stuðuls møguleikum eitt nú Dansk Tipstjeneste. Hetta átti at veri ein beiskur biti hjá Tjóðveldisflokkinum, sum hevur umsitið málsøkið, men sum nevnt, so situr tjóðskapurin mest omanfyri hálsvølin, og tí er onki gjørt frá samgonguni, fyri at tryggja list og listafólkum góðar karmar og mennandi virkiskor. Nú tað stundar móti løgtingsvali, so skal stingast út í kortið, hvat komandi samgonga skal gera.

**Hvønn mentanarpolitik hevði fullveldis samgongan.**
At gera eina breiða politiska semju um framtíðar mentanarpolitikk er helst klókt, og her er tað fyrst og fremst neyðugt at semjast um játtanina til flaggskipið í mentanarpolitikkinum, Mentanargrunn Landsins. Men at vevja upp í eina mentanarpolitiska ætlan, hvussu býtast skal millum ymsu listagreinirnar er enn ein roynd at snara orðaskiftinum burtur frá manglandi mentanarpolitikkinum í hesum samgonguskeiðnum. Ì bóklinginum Mentan og menning stendur at "Ein onnur týðandi fortreyt fyri, at henda ætlan skal eydnast, er, at hon fær breiða undirtøku millum flokkarnar á tingi so væl sum frá teimum felagsskapum og stovnum, sum umboða mentanarlív og listafólk." Hvussu játtanin til Mentanargrunnin skal býtast, skal nevndin fyri grunnin taka sær av. Játtanin skal ikki frammanundan leggjast fast á eitt prosentvíst býti millum listagreinirnar. Hetta hugskotið minnir mest um hugsanina, sum formaðurin í Mentannarnevndini í løgtinginum, Jógvan á Lakjuni, hevði um Mentanargrunnin. Hann kallaði nevndina nøkur fólk í Havn, sum ikki megnaðu at býta pengarnar út aftur. Bóklingurin Mentan og menning vísir eisini á, at løgtingslógin um Mentanargrunn Landsins má endurskoðast og broytast, men hetta er onki nýtt, og ein undrast hví landsstýrismenn Tjóðveldisfloksins ikki fyri langari tíð síðan eru farin til arbeiðis.

Her má broyting koma í!

Og henda broyting má koma nú!

Hesum vil Javnaðarflokkurin slóða fyri.

# Loysing her og nú – ella vælferð!

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Javnaðarflokkurin vil fyrst og fremst bøta um vælferð Føroya fólk!

Fáa fullveldisflokkarnir meirluta á løgtingi við komandi val, so verður loysing úr ríkisfelagsskapinum framd innan fýra ár.

Hetta fer at kosta okkum føroyigum vælferðina fyri fleiri ártíggir fram í tíðina.

Tað er hetta, komandi løgtingsval snýr seg um. Og er tað tí sera umráðandi, at sitandi samgonga missur sín meirluta á Løgtingi.

Umframt allar teir fyrimunir vit hava við ríkisfelagsskapinum, sum vit ikki rinda fyri, so rindar danski ríkiskassin árliga, í og uttanum tann sonevnda blokkin, uml. kr. 850 mill. til m.a. løgreglu, rættarskipan v.m. Hesin peningur hvørvur við loysingini, umframt at vit missa øll rættidir í Danmark.

Tey seinastu fýra árini hava vit haft besta fiskiskap og hægstu fiskaprísir nakrantíð. Hóast tað, hava vit nærum ikki megna at bøta um vælferðarøkini í Føroyum, sum framvegis hava somu treytir, sum undir samfelagskreppuni í byrjanini av níti-árunum

Hóast tað vilja fullveldis- og loysingarflokkarnir standa við, at okkum ikki tørvar nevnda blokkstuðul, sum teir tí hava minkað við kr. 366 mill. árliga frá 2002 at rokna, men hetta er ikki veruleikin í samfelagið okkara, Føroyum.

Veruleikin er tann, at okkum væntar pening til at reka øll vælferðarmálini á ein forsvarligan hátt, ið svarar til nútíðina. Vit eru eftirbátar á nógvum økjum, herundir:

Heilsuøkinum - Skúlaøkinum - Almannaøkinum - Eftirlønarøkinum.

Hertil kemur, at stórar íløgur á samferðsluøkinum standa fyri framman

JAVNAÐARFLOKKURIN hevur tí sett sær fyri, at seta føroya fólk fremst og tess vælferð - fram um nationalromantisku loysingardreymarnar hjá fullveldisflokkunum.

Føroyska samfelagið hevur ikki ráð til at taka loysing frá Danmark her og nú, tí so sindrast vælferðarsamfelagið.

Tí verður neyðugt at gerða eina avtalu við donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðuna, eina avtalu sum peikar á sjálvstýrisleið, men sum er innanfyri ríkisfelagsskapin, og sum varveitir okkara rættindir í Danmark.

Missa vit lívsfrælsi hins einstaka føroyinga fyri loysingina, so hava vit mist meira fyri minni. Tað má ikki henda. Vit seta Føroya fólk fremst.

Veljið tí JAVNAÐARFLOKKIN.

# Hví velja annan flokk enn Sambandsflokkin?

**Edmund Joensen**



Ofta hoyra vit fólk siga naka soleiðis: "Eg eri sambandsfólk", ella "eg eri ikki loysingarfólk".

Størsti parturin av føroyingum hoyra til hendan bólkin, tað vísa eisini veljarakanningar.

Hesi fólkini hava eisini tað til felags, at tey ynskja at viðurskiftini í ríkisfelagskapurin skulu verað vælvirkandi og nýmótans. Akkurát hvussu og hvat, eru ivaleyst ymsar meiningar um.

Hesi fólkini er helst samd um, at hetta skal gerast á ein fyri Føroyingar virðiligan hátt, sum framvegis ger okkum føroyingar stoltar sum tjóð, og byggir brúgv ímillum partarnar í ríkisfelagskapinum.

Hesi fólkini vilja sjálvandi ikki av við ríkisborgarættin. Hesi fólkini vilja í heila tiki ikki av við vælferðartrygdina. Rættindini í samlaða ríkinum skulu varveitast í heilum líkið, onki minni.

Tann stóri hópurin av hugsandi føroyingum síggja sjálvandi, at verðin er ikki bara svørt ella bara hvít. Tey síggja at loysing og kvetting hoyrir einari farnari tíð til. Loysing loysir ongar trupuleikar, men harafurímóti kollrennur hon alt tað føroyska samfelagið og skapar alskins nýggjar trupuleikar. Ongin nýmótans føroyingur hevur heldur áhuga í at hoyra einari farnari tíð til.

**Nýggja tíðin.**
Samstarv og samvinna ímillum lond, er loysunarorðið og vegurin fram í hesum globaliseringstíðum. Hetta samstarv og hesa samvinnu eiga allir føroyingar eitt gylt atgongumerki til ígjøgnum ríkisborgararættin.

Allir hugsandi føroyingar vita, at tað eru óteljandi fyrimunir í ríkisfelagsskapinum.

Fyrimunir sum eru altavgerandi fyri menningina av øllum tí føroyska samfelagnum.

Sambandsfólk ella ikki loysingarfólk eru eyvitað ikki heilt samd í øllum viðurskifum, td. vinstra og høgra politikki, tað er natúrligt. Men tey eru samd um, at vit skulu saman menna vælferðarsamfelagið. Tað sum skilir, er helst meira, hvussu hetta verður gjørt og hvussu samfelagságóðin annars skal bítast.

Júmen tá íð tað eru so nógvir føroyingar sum eru samdir so langt, hví skulu teir ikki samla seg um tann flokkin, sum er felagsnevnarin fyri hesum øllum somlum.

Hví so velja flokkar sum hava annað í kvittanum og sum hava fyri neyðini at tosa uttanum. Hví vænta at flokkar, sum hava víst at teir vóru klárir at loysa eftir seinasta val, fara at gera annað hesuferð. Hví so velja flokkar sum hava víst at teir vóru klárir og vildu ofra vælferðarsamfelagið.

**Løgmaður lovaði fólkatkvøðu**
Sannleikin er at løgmaður og landstýrið ikki tordu at lova tykkum sambandsfólkum og tykkum ikki loysingarfólkum til eina fólkaatkvøðu. Hetta var annars frammanundan lovað føroya fólki.

Minnist til at løgmaður tá ið hann avlýstið fólkaatkvøðuna umbar seg við, at tað mátti ikki henda, at Føroyar meldaðu seg inní ríkið, um tit atkvøddu nei. Eitt ríki sum vit hava verið partur av í meira enn 600 ár! Hevur nakar hoyrt so skapt! Sigur hetta ikki alt um viðringina fyri fólkaræðinum og um midlarnar sum brúktir verða. Kann nakar hava álit á slíkum monnum?

Hví so eisini umhugsa at velja aðrar flokkar, sum stóðu klárir at fara uppí, fyri at fremja tað sama, sum fullveldissamgongan fyribils er bakka útaftur úr.

**Góðu føroyingar**
Øll sum eru sambandsfólk og øll sum ikki eru loysingarfólk. Tit hava so nógv til felags. Tit hava ikki ráð til ikki at standa saman hesufer.

Tað er størri vandi fyri, at júst tykkara atkvøður verða brúktar til at fremja loysingina og undirgrava vælferðarsamfelagið til hetta valið, enn nakrantíð áður.

Valið komandi er eitt val sum stendur um samband ørumegin og loysing hinumegin Loysingin, fyri at gera hana átiligari, hevur fingi ymisk nýggj nøvn hesuferð. Hetta fyri at grugga málið. Men tað ber av góðum grundum ikki til at verað fyri bæði samband og loysing samstundis. Lati tykkum tí ikki draga við av føgrum orðum.

Sambandsflokkin veitst tú hvar tú hevur. Hann er alternativið til loysingina. Hann má gerast so stórur hesufer, við ábyrgd fyri tykkum, at tað er hann sum setur dagskránna.

Tí tað er hann sum stendur sum felagsnevnari fyri tí stóra hópinum av føroyingum. Bæði fyri sambandfólki og eisini fyri ikki loysingarfólki, tá ið samanum kemur.



VALGREINAR

# Rúsevnini og revsilógin

**Jógvan Arge**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Ein av verjunum í narkomálinum, sum gongur í Føroya Rætti í løtuni, finst at, at rúsevnadómarnir eru harðari í Føroyum enn í Danmark.

Verjin hugsar óivað fyrst og fremst um einhvønn klient, sum hevði sloppið bíligari, um rætturin í Føroyum dømdi á sama hátt sum rætturin í Danmark.

Í hesum umfarinum tekur advokaturin valla støðu til samfelagslig atlit, sum ákæruvaldið sigur seg gera, og dómarin eyðsýniliga tekur undir við.

Tí vendir málið tann vegin, at hóast vit hava stórt sæð somu revsilóg í Føroyum sum í Danmark, so kanst tú verða harðari revsaður í Føroyum enn í Danmark fyri sama misbrot.

Ákæruvaldið sigur, at tað er neyðugt at vera meir á varðhaldi í tí lítla føroyska samfelagnum enn í tí stóra danska, tí árinini í tí lítla samfelagnum kunnu gerast óbøtandi.

Tað er eitt sjónarmið, sum kann skiljast, men sampakkar tað við, at vit hava somu revsilóg í Føroyum og Danmark?

Tað er ein stórur spurningur.

Mær tykir eisini, at tað er sera áhugavert, tá hesin sami verji ger greitt, at fólkið í Føroyum hevur ongantíð skift orð um og enn minni avrátt, hvussu revsingin fyri rúsevnamisbrot eigur at vera.

Kjarni málsins er tí, at føroyingar verða ákærdir og dømdir av donskum embætismonnum og revsaðir eftir donskum lógum, sum føroyingar ikki hava tikið støðu til.

Teir donsku embætismenninir í danska rættarverkinum í Føroyum avgera í stóran mun við sínum ákærum og sínum dómum, hvør rættarsiðvenjan er í Føroyum.

Tað er púra burturvið.

Løgfrøði er sjálvræði, siga íslendingar. Vit eiga at gera hesi orð teirra til okkara og í verki fremja ætlanirnar um at taka upp á okkum ákæruvald og dómsvald.

Ongin sigur, at revsingarnar verða linari, men tá verða tær ið hvussu er ásettar eftir viðgerð og orðaskifti millum føroyingar í Føroyum, sum tær skulu galda fyri.

Og sjálvandi verða lógirnar eins fyri øll í landinum. Hetta er vert at hava í huga hin 30. apríl.

# Skal rúsdrekkalógin liberaliserast??

**Eyðun Jacobsen**
*Valevni Mifloksins í Eysturoy*



Herfyri var frammi á tingi um at liberalisera rúsdrekkalógina. Tað skal verða lættari at ogna sær sterkar drykkir, fleiri skeinkiloyvi skulu fáast til vega, tað skal verða lættari at fáa undantaksloyvi til at skeinkja í veitslum, avgiftirnar á øli og víni skulu lækkast. Føroyingar skullu læra at drekka vín til matin, ergo skulu vit í hesum fullveldistíðum hava eina danska øl og vínmentan í Føroyum.

Nú havi eg búð í Danmark í 17 ár og havi sæð ikki so lítið av tí donsku øl- og vínmentanini.

Er hon til framburð fyri familjurnar?.......nei. Er hon til framburð fyri ungdómin?.........nei. Havi hoyrt sjokkerandi frágreiðingar frá foreldrum, hvørs børn eru endaði langt úti í alkoholismu og tað sum verri er, tí tann liberali tankagangurin um rúsdrekka hevði valdað í heiminum, er tað soleiðis politikarnir vilja hava tað? Ella skal ein kassi av øl standa á hvørjari stillasju, ella í hvørjum arbeiðsskúri, skulu arbeiðarnir venjast við at byrja dagin við eini øl, soleiðis sum tað gongur fyri seg á nógvum donskum arbeiðsplássum?

Eg havi sæð tannáringar rullað í sínari egnu spýggju, tað sær man tíverri eisini tendensir til í Føroyum, tí tað er so lætt at koma at teimum sterku vørunum. Er tað slíkt dagsins politikarar vilja skal verða daglig sjón í landi okkara?

Eg havi sitið á foreldrafundum í Danmark, hvar foreldrini hava greitt frá hvussu tey hava skonkt síni børn full, tá ið tey blivu 14 ár, fyri at læra tey hvussu tey "ikki" skuldu gera, men í flestu førum hevði tað mótsatta við sær og børnini endaðu úti í missbrúki. Er tað tílíkar umstøður dagsins politikarnir vilja hava??

Eg spyrji meg sjálvan: "Hvat hugsa hesir vaksnu, garvaðu politikarar fyri sær?" Menn og kvinnur sum dagliga fáa fráboðanir um ymiska rúsmissnýtslu í landið okkara. Vilja teir nú at tað skal verða enn lættari at skapa fleiri missnýtarar.

Eg tosaði fyri nøkrum døgum síðani við eina kvinnu, sum í nøkur ár livdi sum anonymur alkoholikari og kom út í eitt alvorligt missbrúk, men sum í dag er komin út úr tí lívinum. Hon segði soleiðis við meg: "Við at gerða øl og vín bíligari og harvið lættari tilgongiligt, skapa tit enn fleiri anonymar alkoholikarar". Eg lurti meiri eftir einum fyrrverandi anonymum alkoholikara enn nøkrum peningagrískum politikarum, sum seta menniskjalagnur uppá spæl fyri at fylla landskassan. Nei, lat okkum hækka avgiftirnar á brennivíni, víni, øli og tubbaki og heldur syrgja fyri at aðrar neyðugar vørður kunnu gerðast bíligari. Hetta vil Miðflokkurin á tingi arbeiða fyri, men vit kunnu ikki gera tað uttan fullan stuðul frá veljaranum. So hugsa gjølla hvar tú setur krossin 30 apríl.

# Blokkmyturnar

**Gestur Hovgaard**
*valevni Tjóðveldisfloksins*
*www.gesturhovgaard.com*



Valstríðið er eftirhondini blivin ein spurningur millum afturvendan til blokkbúskap ella framhald av einum sjálvberandi búskapi.

Tey, sum trúgva uppá vælsignilsið í blokkinum, hava nærum ikki orð fyri, hvat kundi verið gjørt: øll tey gomlu høvdu havt tað betri, vegakervið hevði verðið betri útbygt, skatturin hevði verðið lægri, gransking og mentan høvdu verðið sett í hásætið og sjálvt loftvegis farmaflutningur hevði komið á nútímans støði. Hann forbarmi seg.

Turkatrúgvin uppá blokkbúskap byggir á reinar mytur.

Fyrsta mytan er gamla jabbið um, at so longi vit bara hava fiskin, so mugu vit hava blokkin at styðja okkum á. Hetta er at venda veruleikanum á høvdið. Um danir í síni tíð setti seg á reyvina og bíðaði eftir blokki onkustaðni frá, tí teir bara høvdu landbúnaðin at styðja seg til, høvdu hvørki Novo Nordisk, Oticon ella B&O verið til, eiheldur høvdu teir verið førandi vindmylluframleiðarir. Gjørdu finnar og sviar tað sama, hevði Nokia ikki verið ein mobiltelefon og Volvo bara ein kúlulega.

Hóast oljuna, so hava norðmenn langt síðani gjørt greitt, at fiskivinnan fyrst av øllum er tað tilfeingið teir skulu liva av í framtíðini. Veruleikin er tíbetur blivin so, at eisini vit hava eina fjøltáttan og nýskapan í vinnulívinum sum ongantíð fyrr, samstundis sum vit gera okkum leys av blokkinum. Tá vit høvdu sum mest av blokki, var tað møguligt at hava studningsvinnu og einstáttan í senn. Úrslitið var hareftir.

Næsta mytan er tann, at blokkpengar tryggja okkara samfelagsbúskap. Veruleikin hevur víst, at vit fáa minni fyri meira. Tað var jú akkurát tað, sum hendi fyrst í 90'unum. Blokkævintýrið - saman við skuldartøkunum - blivu skoynd uppá Palleba og Marsannu, tey somu, sum nú fáa lovað gull og grønar skógir. Kreppur loysa vit ikki við at dúva uppá blokk, tað gera vit bara við at skapa egnar, tryggar karmar, eitt nú við búskapargrunninum, neyvum eftirliti við búskapargongdini, granskingar- og menningararbeiði, júst soleiðis sum sjøtil hevur verið settur á seinastu árini. Tað er langt síðani prógvað, at samfelagið hongur búskaparliga saman uttan blokk.

Triðja mytan er tann, at blokkurin tryggjar okkum vælferðarsamfelagið. Tá blokkurin er so vælsignaður, hví blivu sambýli, ellis- og røktarheim og nýtt landsjúkrahús ikki bygd, tá alt samfelagið fleyt í pengum í 1980'unum? Tað skuldi verið lætt at rokna út, at tey "næstan gomlu" blivu "gomul" í 2000. Veruleikin er, at tað var ikki blokkur sum bygdi vælferðarsamfelagið. Tað vóru fyrst av øllum bóndin, fiski- og verkamaðurin (m/k), ið gjørdi hetta við at krevja sín rætt og taka seg saman í felagsskapir og byggja egnar skipanir til felags gagn (lutafeløg, fakfeløg, sparikassar, sjúkrakassar, arbeiðsloysisskipanir v.m.). Hendan veruleika, sum eisini Føroya søga er rík uppá, gloymdu vit tíverri so dyggiliga. Ístaðin kopieraðu vit nakrar danskar loysnir, bygdar á blokk, og úrslitið var hareftir. Tí má byrjast av nýggjum við støði í egnum fortreytum. Restin er upp til okkum og ongan annan.

Víst kann ein "blokkur" geva búskaparliga innspræning, tað vísti eitt nú Marshallhjálpin í síni tíð. Men blokkur sum búskaparligt prinsipp er beinleiðis vandamikil. Seinastu árini hava prógvað, at tað ber til at liva uttan blokkin, og samstundis økja vælferðina. Kanska tað er hesin veruleiki ið ger, at afturhaldið hevur ilt við at koma við visjónum fyri framtíðina. Tjóðveldisflokkurin, við sínum greiða politikki um at ábyrgd og avgerðir fylgjast, er í veruleikanum besti garanturin fyri virðiligum viðurskiftum til Danmark, og ikki populistiska útgjaringin hjá teimum sum tosa um "ríkisfelagsskap", men í veruleikanum rópa eftir blokki.